Februar 2014

FÓLKASKÚLARÁÐIÐ

# ÍSKOYTISSPURNINGAR TIL TALIS-KANNINGINA

- spurningar, sum fólkaskúlaráðið setti um førleikastovurnar

# Ískoytisspurningar til TALIS-kanningina



- spurningar, sum fólkaskúlaráðið setti um førleikastovurnar

Februar 2014

Fólkaskúlaráðið

INNIHALD

1.0. Inngangur ... 4
2.0. Tilgongdin ... 5
3.0. Uppgávurnar hjá førleikastovuni ... 7
3.1. Samstarv við serøkið ... 8
3.2. Arbeiðsøkið hjá serlærarum ... 9
3.3. Arbeiðsøkið hjá lesivegleiðarum ... 9
3.4. Arbeiðsøkið hjá AKT-lærarum ... 10
4.0. TALIS-kanningin ... 11
4.1. Ískoytisspurningar ... 11
4.2. Um kanningina ... 12
5.0. Samanumtøka og tilmæli ... 16
6.0. Keldur ... 18
7.0. Skjøl ... 19

## FÓLKASKÚLARÁÐIÐ

Karolina Matras, undirvísari og granskari, er forkvinna

Marjun Ziskason, lærari og ritstjóri, er skrivari

Jenny Lydersen, undirvísingarleiðari, er samskipari

Tonnie Strøm, lærari og lesivegleiðari

Jónleif Johannesen, fyrstilærari og AKT lærari

Annika Sølvará, cand.mag., Heim og Skúli

Fólkaskúlaráðið, ið táverandi landsstýriskvinna í mentamálum setti 1. februar 2011, hevur hildið regluligar fundir síðani. Landsstýriskvinnan valdi fólk í ráðið eftir serkunnleika, og ráðið hevur býtt økini sínámillum samsvarandi hesum.

Tey, sum hava verið við at gjørt ískoytisspurningarnar um førleikastovurnar til Taliskanningina, eru: Karolina Matras, Jenny Lydersen, Tonnie Strøm, Jónleif Johannesen, Andrass Hendriksen og Marjun Ziskason. Annika Sølvará hevur verið við til viðgerðina av spurningunum.

## 1.0. INNGANGUR

Í september 2013 var TALIS-kanning gjørd, og í hesum sambandi valdi Fólkaskúlaráðið at fáa ískoytisspurningar um førleikastovurnar við í kanningina. Áðrenn kanningarúrslitini verða lýst, verður greitt frá tilgongdini til førleikastovurnar og uppgávunum, sum ætlanin var, at førleikastovurnar skuldu røkja.

## 2.0. TILGONGDIN

Í tilmælinum um sernámsfrøði, ið Fólkaskúlaráðið handaði landsstýrismanninum (MMR, 2011), varð umrødd førleikastova, ið m.a. skuldi samansjóða fakliga serkunnleikan í skúlunum og skuldi koma ístaðin fyri táverandi sertoymi. Mentamálaráðið heitti á Fólkaskúlaráðið um at gera eitt upprit um førleikastovur. Hetta upprit var handað landsstýrismanninum (MMR, 2012).

Landsstýrismaðurin í mentamálum valdi at fylgja uppritinum og skipaði fyri, at førleikastovur vórðu settar á stovn í skúlaárinum 2012/13.

Tíðin frá tí, at uppritið var gjørt, til førleikastovurnar vóru settar á stovn, var stutt, og vóru tað ikki allir skúlar, ið náddu at seta eina førleikastovu á stovn við skúlaársbyrjan í 2012.

Fyri at kunna um førleikastovuna og eftirmeta virksemið skipaði Fólkaskúlaráðið saman við Mentamálaráðnum fyri evnisdegi 18. februar 2013, har umleið hundrað fólk vóru møtt. Hetta vóru fólk úr so at siga øllum landinum og øllum starvsbólkum, ið eru tengdir at førleikastovunum.

Á fundinum var m.a. løgd fram spurnakanning, ið Fólkaskúlaráðið hevði gjørt, so greiða kundi fáast á, hvussu førleikastovan hevði roynst hetta fyrsta hálva árið, og hvørjar ábøtur skuldu gerast. Eisini hevði tað týdning, at teir skúlar, sum enn ikki høvdu fingið førleikastovu, fingu íblástur og kunning.

Svarini, ið Fólkaskúlaráðið fekk, vístu, at hóast ivi enn var um førleikastovurnar, og bæði leiðarar og lærarar vantaðu vitan um uppgávu og samskipanarøki, so lótu serliga teir størru skúlarnir væl at. Leisturin viðvíkjandi manning og skipan av førleikastovuni riggaði væl. Harafturat var hjálpin skjótari og nærri brúkaranum. Umboð fyri smærru skúlarnar hildu, at tað var trupult at fáa hjálp frá førleikastovunum í størru skúlunum. Uppskotini til ábøtur vóru greið, m.a. at tað hevði týdning at allýsa uppgávurnar hjá førleikastovuni og hjá teimum, ið

starvast í henni, at tørvur var á, at AKT-lærarar og støddfrøðivegleiðarar fáa hóskandi útbúgvingar og eisini at fáa lesivegleiðara o.o. inn í flokkar at fremja ítøkilig átøk.



Mentamálaráðið og Fólkaskúlaráðið mettu tí, at tørvur var á meira kunning um førleikastovurnar. Á nevndarfundi 14. januar 2013 varð støða tikin til, at umframt at kunna um førleikastovurnar á skeiðsdegi og á skúlaleiðarafundi, skuldi Fólkaskúlaráðið hava nakrar ískoytisspurningar í TALIS-kanningini, sum varð sett at verða í september 2013.

Endamálið við ískoytisspurningunum var at fáa innlit í, hvussu førleikastovurnar høvdu virkað higartil, og at eftirmeta, um kunningin á vári 2013 hevði verið nøktandi.

## 3.0. UPPGÁVURNAR HJÁ FØRLEIKASTOVUNI

Høvuðsuppgávurnar hjá førleikastovuni eru at menna skúlans arbeiði sum heild, og serliga at fylgja næmingum og flokkum, har stórar avbjóðingar eru, veita lærarum og næmingum hjálp og ráðgeving umframt at samskipa og menna náms- og fakligu førleikarnar í skúlanum. Í arbeiðinum vórðu m.a. hesi øki raðfest:

- næmingar fáa skjóta og góða hjálp í nærumhvørvinum
- fyribyrgjandi serundirvísing
- førleikin hjá lærarum at arbeiða næmingalagað
- supervisión í trivnaðarligum og didaktiskum spurningum
- vitan hjá lærarum um mál- og lesimenning
- vitan um undirvísingarhættir
- lesikanningar sum grundarlag undir skipan av undirvísing hjá einstaka næminginum
- námsfrøðiligt umhvørvi í skúlunum
- gjøgnumskygni í miðfirraðu tímunum
- allýsa arbeiðsøki hjá starvsfólkunum

Førleikastovan er sett á stovn at menna vanligu undirvísingina, seta í verk fyribyrgjandi átøk og at veita næmingum, sum hava ilt við at fóta sær, skjóta hjálp bæði fakliga og sosialt. Hetta skuldi havt við sær, at tørvurin á serundirvísing minkar. Førleikastovan skal eisini gera uppskot um, hvussu miðfirraða undirvísingin, sum er ætlað at lyfta vanligu undirvísingina verður fyriskipað og lagað til ávísa tørvin bæði hjá næmingum og flokkum. Á sama hátt er við tímunum til serligan tørv, sum eru ætlaðir næmingum við serligum avbjóðingum.

### 3.1. SAMSTARV VIÐ SERØKIÐ

Uppgávan hjá førleikastovuni er í høvuðsheitum at hjálpa lærarum at tryggja, at vanliga undirvísingin er á einum høgum fakligum og námsfrøðiligum stigi, og at næmingarnir trívast. Harumframt er samstarvið við serøkið eisini avgerandi fyri, at allir næmingar fáa tær avbjóðingar, teimum tørva. Í dagliga arbeiðinum í skúlunum er umráðandi, at hjálp og ráðgeving eru tøk og verða veitt beinanvegin. Lærarar hava t.d. tørv á hjálp og ráðgeving, tá ið teir skulu velja arbeiðshátt og arbeiðstilfar til næmingar við serligum avbjóðingum.



Í samstarvinum við serøkið má arbeiðast við næmingalaging, tí hetta er grundleggjandi í mun til næmingarnar við serligum avbjóðingum, t.d. tá ið næmingurin ikki klárar at hugsavna seg um læringina. Í tílíkum førum er talan um at fyribyrgja truplum støðum. Hetta kann gerast við tilfari, eyka stuðli, skeiðum í bólkum og fakligum og sosialum skeiðum í flokshøpi.

Fyribyrgjandi serundirvísing kann vera at eygleiða næmingar í undirvísingini og sosiala felagsskapinum og at ráðgeva um, hvørji atlit og fyriskipanir eiga at verða sett í verk.
Førleikastovan eigur at tryggja, at allir næmingar, sum hava trupulleikar, fáa best hóskandi hjálpina. Førleikastovan skal eisini tryggja, at skúlin alsamt fylgir við læring og trivnaði hjá einstaka næminginum, og at so stutt tíð, sum møguligt gongur, til næmingurin fær neyðuga hjálp. Soleiðis ber til at fyribyrgja, at sjálvsvirðið hjá næminginum fellur, og harvið eisini dirvi og hugurin at læra.

Í sambandi við sernámsfrøðiliga økið er leikluturin hjá førleikastovuni at hjálpa lærarum í flokkunum at fyribyrgja, at trupulleikarnir sleppa at vaksa. Har, sum álvarsligir trupulleikar eru, er tað Sernám, sum hevur ábyrgd av at koma við neyðugu útgreiningunum og tímunum, sum krevjast. Førleikastovan hevur

leiklutin sum samskipari og vegleiðari, so allar góðar kreftir í skúlanum leggja orku í, at næmingurin fær góðan stuðul og hjálp at megna avbjóðingarnar.



Neyðugt er at allýsa arbeiðs- og ábyrgdarøki hjá hvørjum fakbólki, fyri at tryggja, at uppgávurnar hjá førleikastovuni verða greiðari og lættari at seta í verk. Arbeiðs- og ábyrgdarøkini kunnu greinast soleiðis:

### 3.2. Arbeiðsøkið hjá serlærarum

- Leiðari í førleikastovuni
- Greina og samskipa undirvísingarlig og sosial átøk
- Ráðgeva skúlaleiðslu í sambandi við at seta í verk fyribyrgjandi undirvísingarlig og sosial tiltøk bæði við atliti at einstøkum næmingum og flokkum
- Ráðgeva leiðslu skúlans í náms- og sernámsfrøðiligum spurningum
- Kunna starvsfólk og avvarandi um støðuna hjá teimum, sum fáa sernámsfrøðiliga hjálp og at fylgja við gongdini
- Vegleiða lærarar/námsfrøðiligar stuðlar við millum annað at útvega hóskandi tilfar og hjálparamboð.
- At leiðbeina um arbeiðshættir í serundirvísingini og at vísa á neyðug fyrilit í floksundirvísingini
- Í tann mun, tað er neyðugt, samskifta við skúlalækna, skúlaheilsufrøðing, foreldur, lærarar/námsfrøðiligar stuðlar og onnur viðvíkjandi ávísum barni/næmingi ella einumhvørjum viðkomandi spurningi innan arbeiðsøkið
- Skipa fyri fundum/skeiðum bæði fyri starvsfólki í førleikastovuni, lærarum og námsfrøðiligum stuðlum og foreldrum

### 3.3. Arbeiðsøkið hjá lesivegleiðarum

- Skrivari í førleikastovuni
- Seta í verk styttri undirvísingarátøk fyri m.a. lesiveikum

- Skipa fyri lærarasamstarvi um lesing
- Vegleiða lærarar í næmingalagaðari undirvísing
- Stuðla lærarum í teirra arbeiði við lesing
- Veita íblástur til at menna lesipolitikk skúlans
- Hjálpa lærarum at eftirmeta og greina úrslit við atliti at næmingalagaðari undirvísing
- Samstarva við serlærara og leiðara skúlans um lesiundirvísing skúlans og kunna átaka sær at verða samskipari í samstarvstoymum, har serlærarar og AKT-lærarar eisini luttaka
- Skipa fyri fundum um lesing
- Skipa fyri skeiðum um mál- og lesitilgongdir
- Skipa fyri skeiðum í fakligari lesing og øðrum undirvísingarhættum



### 3.4. Arbeiðsøkið hjá AKT-lærarum

- Tosa við flokkin um trivnað, skipa fyri tiltøkum at fremja trivnað og fyribyrgja happing
- Eygleiða, hvussu lærarar og næmingar samskifta og veita vegleiðing
- Gera saman við lærarum floksins AKT-virkisætlan fyri einstaka næmingin og/ella flokkin
- Samrøða, vegleiðing og supervisión við lærarar
- Samrøða við einstakar næmingar, bólkar og foreldur
- Luttaka á foreldrafundum og toymisfundum
- Bráðfeingishjálp viðvíkjandi áður nevndu trupulleikum
- Hjálpa til við inklusjón

## 4.0. TALIS-KANNINGIN

Fólkaskúlaráðið heldur, at tað er sera týdningarmikið at fylgja við tiltøkum, sum eru sett í verk. Fyri at fáa førleikastovurnar at virka á skilabestan hátt, er neyðugt við áhaldandi innanhýsis og uttanhýsis eftirmetingum. Í hesum sambandi heitti Fólkaskúlaráðið á Mentamálaráðið um at fáa ískoytisspurningar um førleikastovurnar við í TALIS-kanningina.
Spurningar, ið Fólkaskúlaráðið vildi fáa greiðu á, snúðu seg um, hvussu førleikastovurnar virka, og um endamálið, sum lýst er í tilmælinum, verður fylgt.

Eisini vildi ráðið fáa greiðu á, um uppritið um førleikastovur tænti sínum endamáli at upplýsa um, hvussu førleikastovurnar skuldu skipast, hvørjum starvsfólkum tørvur var á, og hvussu arbeiðsbýtið teirra millum skuldi vera.

Fólkaskúlaráðið legði høvuðsdentin á at fáa upplýsingar um hesi øki:

- Kunnleikan um førleikastovurnar.
- Røkkur førleikastovan út til allar skúlastøddir kring landið?
- Gjøgnumskygni um, hvussu miðfirraðu tímarnir verða brúktir.
- Á hvørjum økjum ynskja lærarar og leiðslur hjálp frá førleikastovuni?
- Á hvørjum økjum hava lærarar og leiðslur fingið hjálp frá førleikastovuni?
- Í hvønn mun hevur førleikastovan økt fakligu tilvitanina um inklusjón?

### 4.1. ÍSKOYTISSPURNINGAR

TALIS-kanningin var í fleiri pørtum. Umframt sjálva TALIS-kanningina, sum er gjørd á slíkan hátt, at hon kann samanberast við onnur lond, vóru tvey ískoyti gjørd. Eitt frá Føroya Lærarafelag, og so hetta frá Fólkaskúlaráðnum um førleikastovur.

Undirtøkan at svara TALIS-kanningini var ikki góð. 48% av lærarunum hava svarað, harav 32% (272) svaraðu øllum spurningunum. 52% av skúlaleiðarunum hava svarað, harav 43% (19) svaraðu øllum spurningunum. Teir 272 lærararnir og teir 19 leiðararnir, ið hava svarað øllum spurningunum, eru grundarlagið undir talvunum og greiningini av hesi kanning.



Fyrivarni eigur at vera tikið fyri heldur lágu undirtøkuni, ikki minst í skúlum við millum 50-200 næmingum. Hóast hetta fyrivarni er neyðugt, meta vit, at svarini geva greiðar ábendingar, sum til ber at arbeiða víðari við.

## 4.2. Um kanningina

**Spurningur 1**

Spurt varð, hvussu nógvir næmingar eru í skúlanum. 15% av lærarunum, sum luttóku í kanningini í skúlum, har næmingatalið er millum 50 – 100, hava svarað, meðan 21% eru í bólkinum 101 – 200 næmingar og 64% í bólkinum, sum er yvir 200 næmingar.

**Spurningur 2**

Í kanningini varð spurt, um lærarar og leiðarar vita, hvat miðfirraðu tímarnir verða brúktir til í teirra skúla. Skúlaleiðararnir vóru munandi greiðari um, hvat tímarnir verða brúktir til. Skúlaleiðarar svaraðu, at teir søgdu seg vita, hvat tímarnir verða brúktir til. 13% av lærarunum, sum svaraðu, vistu ikki, hvat tímarnir verða brúktir til, og 27% vistu, at teir verða brúktir, men ikki til hvat.

Í spurninginum um, hvør lesur tímarnar í skúlunum, eru svarini rættiliga spjødd fyri lærararnar, meðan skúlaleiðararnir eru greiðari.

Til spurningin, um miðfirraðu tímarnir verða brúktir til annað enn at hjálpa næmingum, ið hava eitt sindur tungt við at læra, eru tað 11% av lærarunum, ið svara, at so er, meðan talið er 16% hjá skúlaleiðarum.

**Spurningar 3, 4 og 5**

Flestu leiðarar og lærarar vita, at førleikastovur eru skipaðar í fólkaskúlanum. 90% av lærarunum vita hetta, og 95% av skúlaleiðarum.

Flestu lærarar (73%) søgdu seg hava fingið at vita um førleikastovurnar frá skúlastjóra sínum. 56% høvdu fingið hetta at vita frá starvsfeløgum. Lærarar søgdu seg eisini hava fingið kunnleikan frá Skúlablaðnum, á skeiði ella frá øðrum keldum. Til bar at velja fleiri svarmøguleikar.

Flestu skúlaleiðarar søgdu, at teir høvdu fingið kunning um førleikastovurnar frá Mentamálaráðnum (89%). Hinir høvdu fingið at vita um førleikastovuna frá somu keldum sum lærararnir.

93% av lærarunum, ið svaraðu, hava førleikastovu, meðan talið er 83% hjá skúlaleiðarunum.  Skúlar, ið hava 1 - 49 næmingar, kunnu ikki hava egna førleikastovu, men fáa tilboð um at verða knýttir at førleikastovu í einum størri skúla.

Av svarunum sæst týðiliga, at tá kanningin varð gjørd, høvdu allir størru skúlarnir (fleiri enn 200 næmingar) skipað førleikastovur. Ikki allir miðalstórir skúlar høvdu førleikastovur. Umleið helmingurin av smærru skúlunum (1-50 næmingar) vóru sambært svarunum knýttir at førleikastovu í økinum.

**Spurningar 6, 7 og 8**

Spurdir um, hvat lærarar ynskja, at førleikastovan veitir hjálp til, varð svarað breitt. Lærarar ynskja í størri ella í ávísan mun hjálp til øll økini, ið eru nevnd í kanningini: vegleiðing, kanning, eftirmeting, tilfar, inklusjón, undirvísing, fyribyrging og samskifti við næmingar, foreldur, starvsfelagar, Sernám og forskúlaøkið. Umleið ein fjórðingur av lærarum ynskja ikki hjálp frá

førleikastovuni til samskifti við næmingar og foreldur, og 14% vita ikki. Meira enn triðingur ynskir ikki hjálp til samskiftið við starvsfelagar, og 14% vita ikki.



Ein lutfalsliga stórur partur av lærarunum svaraðu, at teir vita ikki, um teir ynskja hjálp til tey ymisku økini. Hesin parturin er millum 8 - 20%.

Støðan hjá skúlaleiðarunum er greiðari. Teir vita í størri mun, hvat teir ynskja at fáa hjálp til. Allir vilja hava hjálp til vegleiðing og kanning. Allarflestu vilja hava hjálp á øllum økjum. 20% av skúlaleiðarunum vilja ikki hava hjálp til undirvísingina.

Til spurningarnar um, í hvønn mun lærarar og skúlaleiðarar fáa hjálp frá førleikastovuni, og hvussu væl førleikastovan hevur hjálpt innan lesiøkið, trivnaðarøkið og innan serøkið, er nokk so stórur munur á, hvat lærarar og skúlaleiðarar svara.

20% av lærarunum hava í stóran mun fingið hjálp frá førleikastovuni, meðan 56% hava fingið hjálp í ávísan mun.

Hjá skúlaleiðarunum eru tað 53%, ið hava fingið hjálp í stóran mun, og 33,5% í ávísan mun.

Lutfalsliga færri lærarar siga seg fáa hjálp innan trivnaðarøkið enn innan hini økini, ávíkavist 52%, ið fáa stóra ella avmarkaða hjálp innan trivnaðarøkið, 67% innan lesiøkið og 66% innan serøkið.

Trivnaðarøkið fyllir nógv í skúlunum, tí kann tað undra, at lutfalsliga færri siga seg hava fingið hjálp til hetta økið. Ein møgulig orsøk fyri vantandi hjálpini á trivnaðarøkinum er, at AKT-persónurin í førleikastovuni ikki hevur eins góða útbúgving sum lesivegleiðararnir og serlærararnir.

**Spurningur 9**

Eitt av endamálunum við førleikastovuni er at økja fakligu tilvitanina um inklusjón, so at skúlin skal verða betur førur fyri at lyfta hesa uppgávuna, sum er partur av dagliga arbeiðinum í skúlunum.



43% av lærarunum svaraðu, at førleikastovan hevur økt fakligu tilvitanina um inklusjón, meðan talið hjá skúlaleiðarunum er 40%.
23% av lærarunum og 27% av skúlaleiðarunum svaraðu nei.
35% av lærarunum og 33% av skúlaleiðarunum svaraðu, at tað vita teir ikki.

## 5.0. SAMANUMTØKA OG TILMÆLI

Hetta er annað skúlaárið, at førleikastovurnar virka, so tá ið kanningin varð gjørd, hevði skipanin eitt ár á baki. Skipanin er ment í verandi skúlaári bæði við tímum til arbeiðið og samstarvi millum smáar og stórar skúlar, umframt at lærarar við serførleika á økinum røkja uppgávur í fleiri skúlum.

Fyrilit má verða tikið fyri, at tað eru 32% av lærarunum, ið hava svarað allari kanningini og 43% av skúlaleiðarunum. Kanningin gevur tó rættiliga týðiligar ábendingar um støðuna, tá ið kanningin varð gjørd í september 2013. Førleikastovur eru skipaðar á flestu stóru og miðal stóru skúlunum, og eru nógvar ábendingar um, at tær sum heild virka væl.

Vit kunnu staðfesta, at kunningin um førleikastovurnar ikki hevur verið nøktandi. Harafturat meta vit, at tað er neyðugt við eini tilvenjingartíð, so at lærarar kunnu gera sær royndir og kenna seg tryggar við at brúka førleikastovuna.

Fólkaskúlaráðið heldur, at svarini benda á, at førleikastovur sum heild virkar væl, men at smærru skúlarnir enn ikki eru knýttir at førleikastovunum í størru skúlunum í nóg stóran mun.

Fólkaskúlaráðið er sannført um, at førleikastovurnar eru týdningarmikil liður í at menna fakliga, námsfrøðiliga og trivnaðarliga arbeiðið í skúlunum. Skúlarnir hava sett arbeiðið á dagsskránna, nógv er rokkið eftir stuttari tíð, men enn eru stórar avbjóðingar til tess at fáa skipanina at virka eftir ætlan. Týdningarmikið er, at dentur verður lagdur á at menna dagligu undirvísingina, og at fyribyrgjandi arbeiðið og inklusjón verða raðfest høgt, so at allir næmingar fáa hóskandi avbjóðingar.

Førleikastovurnar, ið eru partur av dagligu undirvísingini og verða fíggjaðar av fólkaskúlajáttanini, skuldu, um arbeiðið eydnast, ført til, at undirvísingarstigið hækkar, og at tørvurin á sernámsfrøðiligari hjálp í dagligu undirvísingini minkar. Tá hevði borið til at gagnnýtt sernámsfrøðiligu játtanina enn betur til m.a. næmingar, ið hava tørv á fjølbroyttum serligum fyriskipanum, so at næmingar við ymiskum avbjóðingum fáa bestu umstøður at mennast sum partur av felagsskapinum.

Fólkaskúlaráðið mælir til, at:

- arbeiðsøkini hjá starvsfólkunum í førleikastovuni verða lýst
- normal og serøkið verða allýst
- starvsfólk verða kunnað um, hvat miðfirraðu tímarnir verða brúktir til, og hvør lesur tímarnar
- kunningarátak ella skeið verða fyriskipað til at tryggja, at bæði leiðarar og lærarar eru væl kunnaðir og duga at nýta førleikastovuna
- Mentamálaráðið eigur at tryggja, at allir smáir skúlar fáa gagn av førleikastovuni, og at skipan verður gjørd, so at lærarar við serkunnleika hjálpa til í øðrum skúlum, sum ikki hava egna førleikastovu ella ikki hava neyðugu fakligu førleikarnar
- førleikastovan er mannað við lærarum, ið hava kravdu útbúgvingarnar og góðar eftirútbúgvingarmøguleikar
- førleikastovurnar javnan kunna hvørja aðra, t.d. á stevnu teirra á First Class um teirra góðu royndir, so til ber at læra hvør av øðrum. Eisini, at umboð fyri førleikastovurnar javnan hittast á kunningarfundi at tosa um góðar royndir, og hvat ikki hevur virkað eftir ætlan
- skipanin og arbeiðið í førleikastovunum javnan verða eftirmett m.a. í sambandi við næstu TALIS-kanningar
- greiðar mannagongdir verða gjørdar um ferðing og arbeiðstíð hjá starvsfólki í førleikastovum, sum eru knýtt at førleikastovum í øðrum skúlum
- AKT-lærarar og støddfrøðivegleiðarar fáa neyðuga útbúgving. Eisini er umráðandi, at starvsfólkini hava umstøður fyri fakligum íblástri

# 6.0. KELDUR

Fólkaskúlaráðið. (2011). Tilmæli um sernámsfrøði. www.mmr.fo

Fólkaskúlaráðið. (2012). Upprit um førleikastovur www.mmr.fo

Fólkaskúlaráðið. (2012). Tilmæli um førleikamenning – tørvur og skipan. www.mmr.fo

# 7.0. SKJØL



Skjal 1: Evnisdagur um Førleikastovur í Mentamálaráðnum 18. februar 2013.

Skjal 2: Skipan og fortreytir við atliti at skúlastødd, tímum og fakligum førleikum. Jenny Lydersen

Skjal 3: Endamálið við Førleikastovuni. Karolina Matras

Skjal 4: Eftirmeting av evnisdegi um Førleikastovur,

sum varð hildin á Hotel Føroyum 18. februar 2013.

Skjal 5: Førleikastovan: Úrslit av spurnarbløðum til leiðslur, serlærarar, lesivegleiðarar og AKT-lærarar. Tonnie Strøm og Marjun Ziskason

Skjal 6: Hví virkar førleikastovan væl? Jónleif Johannesen

Skjal 7: Skúlaleiðarafundur 13. mars 2013.

Skjal 8: TALIS-kanningin